

MYND: JENS KRISTIAN VANG

– Eg havi ikki gjørt so nógvan tónleik í ár, sum eg havi gjørt onkur onnur ár, men tað hevur verið nógvur aktivitetur rundan um meg, sigur Hanus G. Johansen

# Pól F passar væl til mín

– MÆR DÁMAR SERA VÆL **YRKINGARNAR** HJÁ **PÓL F**. TÆR PASSA **VÆL** TIL MÍTT **TEMPRAMENT**, OG VIT ERU **LÍKIR** Í HUGSANARHÁTTI, SO TAÐ **KENNIST** OFTA LÆTT AT GERA **LØG** TIL HANSARA **YRKINGAR**, SIGUR **HANUS G. JOHANSEN**, SUM ER AKTUELLUR VIÐ **NÝGGJARI** FLØGU



**TÓNLEIKUR**
**Eyðun Klakstein**
eydun@sosialurin.fo

Ein hugtungan mánadag í januar leitaði Hanus G. Johansen sær inn á gólvið hjá Jónas Bloch Danielsen, sum fæst við at taka tónleik upp og ljóðblanda live-framførslur.

– Eg gramdi meg um, at eg hevði so nógv tilfar, sum eg ikki fekk brúkt til nakað, sigur Hanus.

Teir báðir drukku ein góðan kaffimunn, og Jónas helt, at tað kundi ikki bera til, at Hanus ikki slapp út við sínum tónleiki.

– Dagin eftir ringdi hann til mín og segði, at hann hevði skipað fyri konsertum fyri meg. Hann hevði funnið spælistað og tónleikarar, og tvær vikur seinni høvdu vit tríggjar útseldar konsertir í Havn, sigur Hanus.

Hetta gjørdist startskotið til nýggju fløguna, sum kom út í gjár. Yrkingarnar eru eftir Pól F. Joensen, og Hanus hevur sett løg til. Hetta er onnur útgávan hjá Hanusi, har hann syngur orð hjá Pól F.

## Hugsa eins

Hanus G. Johansen hevur skrivað løg til eini 70 yrkingar hjá Pól F. Joensen, og nú eru væl yvir 20 yrkingar komnar út á fløgu.

– Mær dámar sera væl yrkingarnar hjá Pól F. Tær passa væl til mítt temprament, og vit eru líkir í hugsanarhátti, so tað kennist ofta lætt at gera løg til hansara yrkingar, sigur Hanus.

Hetta er onnur útgávan hjá Hanusi í hesum ári. Fyrra útgávan kom, tá ið hann fylti 60.

– Eg havi ikki gjørt so nógvan tónleik í ár, sum eg havi gjørt onkur onnur ár, men tað hevur verið nógvur aktivitetur rundan um meg. Tað hava verið tvey stór hátíðarhald í sambandi við føðingardagin hjá mær, eg havi givið tvær fløgur út, og eg havi havt nógvar framførslur, sigur Hanus.

Stóra útgávukonsertin hjá Hanus verður í Norðurlandahúsinum tann 9. desember.

## INNIHALD

2 KLUMMA: **AGURKUTÍÐIN ER AVLÝST**
4 INTEVIEW: **TERJI RASMUSSEN**
8 TIPS: **FILMAR**
9 90 SEKUND: **JÁKUP SVERRI KASS**
10 BAKGRUND: **FYRISITING**
12 INTERVIEW: **BERGUR MIKLADAL**
14 TIL ARBEIÐIS: **ANNA JAKOBSEN**
15 UMAFTURAFTURUM: **HØGNI DJURHUUS**
16 BÓKAÚTGÁVA: **HANN KEMUR Í LÝSINGINI**
22 MIÐLAMJARR: **TAÐ SIGA TEY Á FACEBOOK OG Í MIÐLUNUM**
23 TAÐ HENDIR: **KONSERTIR, TILTØK, BØKUR OG ANNAÐ**
24 VIKUMYNDIN: **ZLATAN ER SUVERNUR Í SVØRÍKI**

**KLUMMAN**



*Eyðun Klakstein*

# Agurkutíðin er avlýst

Agurkutíðin 2011 er avlýst. Summartíðin, tá ið einki hendir, og miðlarnir mugu vera sera kreativir fyri at fáa tilfar, var heilt øðrvísi komandi ár. Paul Watson hevur boðað frá, at hann kemur til Føroya komandi summar at steðga grindadrápinum, og ein annar umstríddur umhvørismaður arbeiðir eisini við eini ætlan at koma hendan vegin í somu ørindum.

Lagt er upp til eitt hendingarríkt summar, har Føroyar enn einaferð koma í miðdepilin fyri grindadrápið. Ja, vit skulu rokna við meira umtalu og størri trýsti á okkum enn nakrantíð áður.

Nýggju miðlarnar fáa søgurnar at ferðast skjótt og víða, og tiltiknu orðini hjá Mark Twain um, at ein lygn kann ferðast hálva leið kring heimin, meðan sannleikin letur seg í skógvar, eru sum gjørd til internetið – og grindadrápið.

Fólk frá Sea Shepherd vóru í summar í Føroyum, og reaktiónirnar eftir átøkini vóru sum skilst so nógvar, at felagsskapurin av álvara hevur fingið eyguni upp fyri Føroyum aftur.

Tí hetta snýr seg ikki bert um at arbeiða fyri djórunum, tað snýr seg sanniliga eisini um at hava eina forrætning koyrandi, og Sea Shepherd hevur brúk fyri blóðugum søgum, sum kunnu skaffa pengar í kassan.

Tað er tí ikki av tilvild, at felagsskapurin aftur nú setir kós í ein norðan. Watson og hansara fólk hava í fleiri ár serliga livað av stríði í Suðurhøvum, har japanarar hava verið mótstøðufólk. Sjónvarpsrøðin um hvalakríggið hjá Sea Shepherd hevur givið pengar í kassan, og nú ræður um at investera í eitt nýtt stríð. Og tað er í Føroyum.

Og vit kunnu rokna við einum ordans stríði hesaferð. Sjónvarpslið fara at taka upp og klippa sannleikan í Føroyum, og myndir – blóðugar og ræðandi – verða sendar um allan heimin. Í hesum spæli hava føroyingar ongan kjans at verja seg við fakta og siðsøgu. Vit kunnu royna og vilja, men pr-dysturin ímóti Watson og hansara fólki er taptur.

Halda vit fast um, at vit skulu drepa grind, eisini fyri eygunum á útlendsku umhvørvisfólkunum, so kunnu vit eisini rokna við, at tað kann fáa avleiðingar fyri okkara útflutning og búskap.

Og kanska fara vit komandi summar at leingjast eftir agurkutíðum.



VIKUSKIFTI
**Redaktørur:** Eyðun Klakstein
**Útgevari:** Sosialurin, www.sosialurin.fo
**Umbróting:** Sosialurin · **Høvuðssniðgevi:** Pætur Eyðunsson Jensen
**Forsíðumynd:** Bergur Mikladal / Ditte M. Joensen